# Løgtingið skal banna børnum við lóg at ganga úti um náttina

**Løgtingið eigur at leggja upp í og seta lóg í gildi, sum bannar børnum at ganga úti seint um kvøldið og um næturnar, sigur Rúna Sivertsen. Hon heldur, at hetta hevði vart bæði børn og foreldur**

ÚTIGONGUBANN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað líkist ongum, at børn og blaðung ganga úti og vála seint um kvøldið og um næturnar.

Tað heldur Rúna Sivertsen, sum er varalimur í løgtinginum fyri fólkaflokkin í Norðoyggjum.

Hon sigur, at tíverri er tað vanlig sjón at síggja børn og blaðung ganga úti og taka lut í náttarlívinum og tað heldur hon er ein stórur vansi fyri børnini.

Men hon heldur eisini, at hetta er ein trupulleiki, sum Løgtingið eigur at leggja seg út í.

– Løgtingið eigur rætt og slætt at seta eina lóg í gildi, sum bannar børnum og ungum at ganga úti seint á kvøldið og um næturnar, uttan tá ið tey fylgjast við vaksnum fólki.

Fyrstu ferð, hon førdi hesi umstríddu sjónarmið fram, var í Løgtinginum í farnu viku.

Í farnu viku hevði hon sæti á tingi og tá viðgjørdi Løgtingið ætlanin at leggja barnaverndarøkið undir kommunurnar at umsita.

Og tá nevndi Rúna Sivertsen møguleikan fyri, at Løgtingið samtykti eina lóg, sum setti útigongubann í gildi fyri børn og ung, eftir eina ávísa klokkutíð.

Vit hava biðið hana útgreina hesi sjónarmiðini fyri Sosialinum.

Hon sigur, at hetta er galdandi í Ìslandi, at børn og ung hava ikki loyvi at ganga úti seinni enn eitt vist. Og hetta er ein lóg, sum íslendingar hava góðar royndir.

– Børn og ung, sum ganga úti og mala er eisini ein trupulleiki í Føroyum og tí átti okkara Løgting at gjørt sum íslendingar og sett eina lóg í gildi sum segði, at eftir eina ávísa klokutíð, hava børn og ung bara loyvi at vera úti, tá ið tey fylgjast við vaksnum fólki, heldur Rúna Sivertsen.

Hon sigur, at í Íslandi er lógin soleiðis orðað, at um veturin hava børn upp til 12 ár ikki loyvi at ganga einsamøll úti eftir klokkan átta um kvøldið. Børn ímillum 13 og 16 ár hava ikki loyvi at ganga úti eftir klokkan tíggju um kvøldið.

Um summarið eru tíðarfreistirnar fluttar tveir tímar fram til ávikavist klokkan 10 og midnátt.

Tó fáa børn, sum eru á veg heim frá ítrótti, samkomum og øðrum felagslívi, ella tiltøkum, stundir at koma heim, hóast tíðarfreistin er farin.



*– Setir løgtingið eina lóg í gildi, sum bannar børnum og ungum at ganga úti seint um kvøldið og um náttina, hevði tað verið ein stór hjálp hjá foreldrum, sum hava mist tamarhaldið á sínum børnum. Tað hevði eisini vart børn fyri foreldrum, sum svíkja tey, ella sum ikki liva upp til sína ábyrgd, sigur Rúna Sivertsen, sum er varalimur á Føroya Løgtingi*

### Verjir bæði børn og foreldur

Rúna Sivertsen sigur, at tað eru ógvuliga nógvir fyrimunir við eini slíkari lóg.

– Børn og blaðung, sum ganga úti og vála seint á kvøldið og um næturnar, eru í nógv størri vanda enn onnur fyri at gera kriminell.

– Hetta eru børn, sum mangan kosta samfelagnum ovurhondss stórar upphæddir. Hetta eru børn, sum eru í stóran vanda fyri at gerast atferðartrupul. Og tað eru hesi børnini, sum í stóran mun fylla stovnar av ymsum slagi fyri børn og ung við atferðar- og sosialum trupulleikum. Og tað eru hesi børnini sum enda í kriminaliteti og sostatt kunnu oyðileggja sær alla tilveruna.

Rúna Sivertsen sigur, at tað eru rættiliga nógv børn í Føroyum, sum koma tvørt fyri og hon spyr, hvat er galið í einum landi, sum vit kalla heimsins paradís, tá ið so nógv børn og ung kortini koma illa fyri.

Hon heldur, at ein útigongulóg kundi verið ein verja hjá bæði foreldrum og børnum.

– Tað skerst ikki burtur, at tað eru mong foreldur, sum onkusvegna hava mist tamarhaldið á børnunum av ymsum orsøkum og sostatt standa hjálparleys og ikki fáa børnini inn um kvøldarnar.

– Men hetta kann eisini verja børnini fyri foreldrum, sum onkusvegna svíkja tey, antin tí tey hava rúsdrekka- ella sosialar trupulleikar, ella trupulleikar av øðrum slagi. Tekur løgreglan eitt barn ella eitt blaðungt upp seint á kvøldi, ella um náttina, ber til at fara heim til húsa við tí og kanna eftir, hvussu støðan er heima.

– Vísir tað seg, at foreldrini onkusvegna ikki eru før fyri at røkja sínar skyldur mótvegis børnunum, ber sostatt til rættiliga tíðliga at taka stig at hjálpa og stuðla bæði børnum og foreldrum aftur á beint.

Rúna Sivertsen sigur, at orsøkin til at børn, sum ganga úti og vála um næturnar, er, at tey hava foreldur, sum onkusvegna ikki megna at liva upp til sína ábyrgd.

– Slík børn eru mangan løtt offur fyri alskyns ólevnaði og eru skjót at enda í kriminaliteti og rúsevnistrupulleikum og tað kann spilla teimum alt lívið.

Hon ivast ikki í, at var útigongubann sett í verk, hevði tað fyribyrgt nógvum av teimum trupulleikum, sum taka seg upp við børnum og ungum.

Og hon heldur, at tá ið okkara næsta grannatjóð, íslendingar, hava eina slíka lóg, kunnu vit eisini hava eina.

### Nokta ikki børnum at spæla

Rúna Sivertsen leggur stóran dent á, at hon er ikki úti eftir at nokta børnum at verða úti og spæla eitt góðveðurskvøld, hóast tað verður nakað seint, tí góðveðurskvøldini eru so fá, at tað skal vera teimum vælunt at sleppa at spæla úti hesi kvøldini.

– Eg eri ikki úti eftir at nokta børnum at spæla í einm grannalagi ella á einum fótbóltsvølli, hóast tað verður eitt sindur seint. Tað, eg vil, er at fáa fatur á teimum børnunum, sum meir og minni taka lut í náttarlívinum, tí tað er hvør sítt.

– Og hóast talan er um lóg, er tað eisini altíð soleiðis, at løgrelgan, sum skal útinna lógina, má brúka vit og skil í sínum arbeiði.

Og Rúna Sivertsen sigur, at íslendingar kenna onki til, at løgreglan gongur og rekur børn heim, sum spæla úti, hóast tíðarfreistin er farin. Tað eru meiri tey, sum ganga og vála á gøtunum, sum løgreglan hyggur eftir.

Hon leggur afturat, at ein slík lóg er ikki heilt ókend í Føroyum, tí hon var í gildi undir krígnum.

# Hesin verður ringur at taka

**Sandvíkingar hava stungið sein sperðil, sum slær øll met og sum verður ringur at taka**

METSPERÐIL
*Áki Bertholdsen*

Nú í flettingini hoyrist nógv um at summi kappast um at hava tann feitasta veðrin.

Men hesi seinastu árini hevur eisini ein ávís kapping tikið seg upp um at fáa tann longsta sperðilin.

Og nú flettingin er farin afturum, er aftur eitt nýtt føroyskt met sett í sperðlum.

Og tað verður eitt met, sum verður ringt at taka.

Tað var, tá ið teir báðir sandvíkingarnir, Álvur Thomsen og Osvald Nielsen, flettu eina ær, at teir settu sær fyri at royna at fáa sperðilin so langan sum gjørligt í eini roynd at sláa metið.



*Óvitarnir forvitnaðist, tá ið teir frættu, at eitt sperðilsmet var á tapetinum. Her standa teir og eygleiða metsperðilin upp á 6,09 metrar. Frá vinstru eru teir Jens, Olgar, Rúni og Herálvur*

Og væl eydnaðist, tí tá ið sperðilin varð strektur út og máldur, var úrslitið heilar 6, 09 metrar.

Gamla metið áttu hvalbingar, tí í fjør stungu Thorstein Thomsen og 10 ára gamli Jón Heini Guðmundsson sperðilin úr eini ær. Hendan sperðilin fingu teir 6,02 metrar og tað var longsti sperðil nakar vitsti um at siga - til nú, sandvíkingar løgdu sjey sentimetrar afturat metinum.

### Tók meiri enn tveir tímar

Hetta var fyrstu ferð, at teir báðir royna seg í hesum nýggja tjóðarítróttinum, so væl hepnaðist.

Men tað tók eisini sína tíð. Tað tók meiri enn ein tíma at venda sperðlinum og meiri enn ein tíma afturat at fylla hann.

Men sperðil er kanska so nógv sagt, tí fyri at fá hann so langan, máttu teir taka mestsum allan garnmørin uppí.

Men tað mátti allar snildir takast í brúk við lunkaðum vatni og sera góðum handalagi og tað gekk til síðst at venda honum.

Tað gekk eisini væl at fylla hann. Allar teir fremstu metrarnar, er hann ógvuliga tunnur, so har vóru pettini smá og onkuntíð stóð nógv á. Men so hvørt, sum teir komu aftureftir, og sperðilin rúmkaðist, vuksu vónirnar um, at tað skuldi eydnast, og tað gjørdi tað so eisini.

### Suðuroyarsperðil

Sperðilin varð stungin upp á gamlan suðuroyarmáta. Alt tað vanliga, nýrini, lundini, tindin og kjøtpetti hiðani og haðani av krovinum vóru brúkt at fylla við, men av at hann var so langur, var eisini neyðugt at taka ein bógv av einum lambi at fylla í.

Sperðilin hongur nú í hjallinum og ræsir. Tá ið hann er passaligur, verður hann kókaður og etin við eplum afturvið.

Gomlu metini í sperðlum áttu suðuroyingar eisini. Í 2000 stungu Rólant Sørensen og Álvur Enni á Tvøroyri eisini ein sperðil, ið var 4,95 metrar. Í fyrrárið stungu sandvíkingar ein sperðil úr eini ær hjá Renhard Thomsen upp á 5,87 metrar. Ì fjør kom so sperðilin fyri fyrstu ferð upp um tað magiska markið upp á seks metrar, tá ið hvalbingar stungu ein upp á 6, 02 metrar, men í ár fingu so sandvíkingar lagt enn nakrar sentimetrar afturat.



*Ætlanin var bara at hugna um hjá mammuni og nýfødda barninum, men eldur kom í skálan, tá starvsfólkini á føðideildini bóðu um stuðul til viðlíkahald*

*Mynd: Jens K. Vang*

# Føðideild á markinum

**Starvsfólkini á føðideildini angra, at tey fóru undir at savna inn pening til viðlíkahald á deildini. Tað er ikki loyvt at skipa fyri almennari innsavning uttan við loyvi frá fútanum, men tað hava tey ongantíð biðið um. Fútin tekur kortini ikki málið upp, tí hann heldur talan var um biddarí heldur enn eina almenna innsavning**

INNSAVNING
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

– Tað var ongantíð meiningin at fáa eld í. Starvsfólkini her skilja væl, hvussu leiðslan raðfestir, og hendan innsavningin var hvørki ætlað at vera vend ímóti leiðsluni ella ímóti politikarum. Hetta var bara ein roynd at taka í egnan barm og sjálv gera okkurt fyri at fáa eitt hugnaligari umhvørvi, sigur Sonja Andersen, deildarleiðari á føðideildini.

Eldur kom í skálan, tá starvsfólk á føðideildini í síðstu viku sendu bræv út til fyritøkur kring landið við eini umbøn um at styðja teimum at fríðka um niðurslitnu deildina. Í brævinum biður ein starvsfólkaarbeiðsbólkur um stuðul til viðlíkahald og ábøtur á deildini. Peningurin skuldi brúkast til nýggjar gardinur, radio og veggjaprýði.

Starvsfólkini ætla at bøta um umhvørvið á øllum sjey stovunum á føðideildini, og arbeiðið skal gerast av fakfólki, skriva tey í brævinum. So kom rok í. Umbønin fekk beinanvegin politikarar at gera sær dælt, og bæði sjúkrahússtjórin og landsstýrismaðurin við heilsumálum kendu seg noyddar at tala at sínum undirsáttum.

Ætlanin var at skava 80.000 krónur saman, men tað ber ikki til at fáa upplýst, hvussu fólk og fyritøkur hava tikið ímóti umbønini, og um nakað er komið inn.

### Einki loyvi

Starvsfólkini á føðideildini hava ikki hugsað sær til, hvørjar avleiðingar óseka brævið fór at fáa. Tey hava eftir øll at døma heldur ikki hugsað um, at tey hava ferðast á markinum fyri, hvat er loyvt.

Ein lóg frá 1934 fyriskipar nevniliga, hvussu tú kanst skipa fyri almennum innsavningum. Tað er bert loyvi at fara undir almennar innsavningar av peningi, um tú fyrst hevur biðið um loyvi frá fútanum. Tað hava starvsfólk á føðideildini ikki gjørt.

Í lógini stendur eisini útgreinað, hvat er at skilja sum almenn innsavning. »En indsamling anses som offentlig, når opfordring til at yde bidrag rettes til andre end personer, der er indbyrdes personlige bekendte eller har særlig tilknytning til personer eller institutioner, til fordel for hvilke indsamlingen sker«.

Greitt er, at brøvini ikki bara eru farin til kenningar ella stovnar, ið hava serligt tilknýti til barnadeildina, og tí kundi bent á, at innsavningin kemur undir reglurnar í lógini.

### Biddaðu pening

Fútaskrivstovan kemur kortini føðideildini til hjálpar og lovar einki at gera við málið. Finn Ougaard varafúti, sum hevur slík mál um hendi, váttar, at føðideildin ikki hevur biðið um loyvi, men tað heldur hann heldur ikki, at hon átti at gjørt.

– Umbønin er vend ímóti heilt ávísum persónum, sum tey vita, hvør er. Hetta er meira at at líkna við at bidda um pengar, og tað er ikki tað sama sum ein almenn innsavning. Ein almenn innsavning er at biða alment øll um at geva pening til okkurt ávíst endamál. So vit umhugsa als ikki at taka hetta málið upp, sigur Finn Ougaard, varafúti.

### Ein læripengi

Starvsfólkini hava ikki skonkt tí ein tanka, at tey vóru á markinum til lógina, og tey ætlaðu heldur ongantíð at fara aftur um ryggin á leiðsluni.

– Hetta varð púra misskilt, og vit kunnu øll læra av hesum. Ætlanin var bara at hugna um hjá mammunum og nýfødda barninum. Hinvegin, so hevur hetta reist eitt gott kjak, og óivað koma nú leiðreglur fyri, hvat er loyvt og ikki at stuðla á einum sjúkrahúsi, sigur Sonja Andersen.

> » Sjúkrahúsið er sum heild gamalt, og tað sæst inni á deildini, at peningur ikki verður nýttur til viðlíkahald av stovunum, har mammurnar liggja við teirra nýfødda barni. Umhvørvið hevur stóran týdning fyri trivnaðin hjá tí einstaka, og vilja vit á barnsburðardeildini royna at betra karmarnar hjá familjuni við tí nýfødda barninum
>
> *Brot úr brævi frá føðideildini*

# MBF eftirlýsir hetjur

**Aftur í ár fer Meginfelag teirra brekaðu at halda altjóða handikappdagin 3. desember við at heiðra onkran, sum hevur gjørt okkurt munagott til frama fyri brekað**

HANDIKAPPDAGUR
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Veist tú onkran, sum hevur gjørt okkurt serliga fyri brekað? So átti tú at boðað Meginfelag teirra brekaðu frá.

3. desember er Altjóða handikappdagur, og hendan dagin hevur MBF heiðrað einum tiltaki, sum hevur gjørt tað høgligari at bera brek. Aftur í ár verður farið at heiðra fólkum, og heitt verður tí á fólk um at vísa á persónar ella stovnar, sum tey halda hava heiðurin uppibornan.

– MBF metir tað hava stóran týdning fyri øll, eisini fólk við breki, at kunna vera saman í samfelagslívinum uttan darvandi fysiskar forðingar. MBF hevur tí valt at nýta altjóða handikappdagin til at lata eina viðurkenning til onkran persón ella stovn, sum hevur gjørt eitthvørt munagott, sum sæst og merkist hjá teimum, ið bera brek, sigur Anna Suffía Durhuus, sum er dagligur leiðari hjá MBF.

Higartil hevur MBF latið viðurkenningina fýra ferðir. Fyrstu ferð var í 1995, tá ið Margarinfabrikkin fekk heiðurin fyri at sína umbygging. Í 1999 fekk Strandferðslan heiðurin fyri broytingarnar umborð á Smyrli og fyri tekningina av komandi suðuroyarferjuni. Í 2001 fekk Pállstova heiðurin, tí tey av sínum eintingum gjørdu eina umbygging, sum var vinarlig ímóti brekaðum. Og í fjør fall heiðurin so til Føroya Sparikassa fyri bygningin yvir við Strond, ið er gjørdur atkomiligur fyri øll.

Hvør fær heiðurin í ár, kanst tú vera við til at avgera.